tóindagsblaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: **Jan Müller**
Fyritaksstjóri: **Krisjan Dahl**
Ljósmyndari: **Kaimar Lindenskov**

Blaðfólk: **Randi Jacobsen - Dagny Joensen -Jóstinus Eidesgaard - Sjúrður Skaale - Eyðun Klakkstein**

Útgevari, uppseting og prent: **P/f Sosialurin**
Bústaður: **Argjavegi 28 Argjum**

Postadr.: **Postsmoga 76 110 Tórshavn**
Telefon: **11820**
Telefax: **14720**

Verið vælkomnir hetlendsku brøður

Oddagrein

Í hesum døgum hava fremstu politikararnir og embætismenninir í Hetlandi verið á vitjan í Føroyum. Hetta hevur sum skilst á bæði teimum og okkara egnu fólkum verið ein uppbyggjandi og positiv vitjan - nakað, sum kann fara at gagna bæði okkum og teimum í framtíðini.

TAÐ kann tykjast fullkomiliga burturvið, at so lítið samskifti og samvinna er millum tveir oyggjabólkar í Atlantshavi, sumliggja so nær hvørjum øðrum. Tí lítið samvinna er. Men her eiga vit helst at taka orðini hjá tí hetlendska løgmanninum at okkum og gera tey til okkara eisini, nevniliga hesi, at vit hava havt eina felags fortíð - latið okkum fáa eina felags framtíð.

HÓAST Føroyar í nærum einum og øllum hava vent eygu og oyru fyri ikki at siga hjørtu móti okkara norðurlendsku grannum, hvat eisini er náttúrligt, so er tað løgið og sp ell, at vit ikki hava stórvegis samskifti við okkara næsta granna, Hetland. Men okkurt kundi bent á, at nú kemur vend í. Føroya løgmaður er boðin til Hetlands at vitja, og kann slík ferð verða næsta stigið í einum komandi samarbeiði.

SJÁLVANDI er oljan í fokus, nú vónirnar til stórt oljuríkidømi í øllum økinum millum Hetland og Føroyar eru í fokus, men her er so nógv annað, sum vit kunnu njóta gott av í einum samstarvi. Her eiga vit so sanniliga ikki at gloyma ta mentanarligu síðuna. Føroyingar hava brúk fyri at víðka sín mentarnarliga sjónarring til at fevna um annað enn Norðurlond. Tí kann eitt víðkað samband við Hetland leggja lunnar undir einum mentanarligum íblástri, sum vit øll hava gott av. Her er so sanniliga nógv at tríva í. Nú er ikki at gevast.

Sosialurin

Lesarabrøv

Grannar okkara í SvF

Nú hava vit aftur sitið eitt leygarkvøld og hugt at sendingini Grannar okkara – og so biðað og biðað eftir, at onkur tíðindi komu úr Íslandi hesa ferð. Men nei, heldur ikki í kvøld.

Tí vil eg her í allari hampuligheit heita á tykkum í SvF um at bera so í bandi, at vit eisini fáa tíðindi frá hesum næra granna okkara, Íslandi.

Tað er okkurt í mær, sum sigur sum so, at her er ikki alt heilt rætt. Tá so og so nógv fólk doyggja, tá eru tíðindi bæði árla og síðla um hetta. Og stór innsavning fer um alt landið, tí vit eru so nógv sum hava familju og vinir har yviri. Men so verður sum øskukalt...

Álvaratos, SvF, kunnu vit ikki eisini frætta úr Íslandi, bara okkurt sovorðið gerandisligt? Tað nýtist hvørki vera um fisk ella deyð, bara okkurt, so vit eisini frætta frá næra granna okkara.

Við tøkk fyri upptøkuna.

Hyggjari

P.S. Og um tað nú ikki ber til, kunnu tit so ikki her í blaðnum siga HVÍ? Kanska er so onkur, sum kann hjálpa okkum.

Nakrar viðmerkingar

til lesarabrævið hjá Joan Christiansen um **Hin góða hirðan í bispagarðinum**

Sambært tænastumannalógini hava prestar skyldu til at búgva í tænastubústøðunum. Tó kann kirkjumálaráðharrin undir serligum umstøðum loysa teir frá hesi skyldu. Tí er tað kirkjumálaráðharrin, ið tekur endaliga avgerð í slíkum málum, og ikki biskupur og stiftsstjórn.

Stutt eftir, at Petur M. Rasmussen varð settur í starv sum dómpróstur 1. mars 1991, spurdi hann meg, um hann ikki kundi bjóða hinum prestinum í prestagjaldinum, sum ongan tænastubústað hevði, dómpróstahúsini at búgva í. So kundi hann verða búgvandi í sínum egnu húsum. Hesu játtaði eg undir teimum treytum, at húsini framvegis vórðu verandi dómpróstabústaður, og at dómpróstur in tí eisini í framtíðini bæði hevði skyldu, men eisini rætt at búgva har. Henda ætlan gjørdist tó ongantíð veruleiki, og hin presturin keypti sær egin hús. Tí var dómpróstur in noyddur at flyta í húsini.

Á sama hátt sum Petur M. Rasmussen hevur Bjarni Bæk, nú hann gjørdist dómpróstur, reist spurningin um at bjóða hinum prestunum í prestagjaldinum dómpróstahúsini, so hann kann verða búgvandi í sínum egnu húsum. Hesum havi eg játtað við somu treytum sum í fyrra førinum, men um nakar teirra tekur av, dugi eg ikki at siga í løtuni. Men mannamunur verður eingin gjørdur í hesum máli. Tí segði eg eisini í viðtali mínum við Sosialin, at flytur ikki annar av hinum prestunum í dómpróstahúsini, so má hesin dómpróstur in flyta, sum hin mátti tað.

Tórshavn hin 23. jan. 1996

Vinarliga
Hans J. Joensen
biskupur

»Oyggjatíðindi« nokta rættleiðing til sínar lygusøgur

Undirritaði faxaði mánadagin kl. 14.20, t.v.s. í góðari tíð undan prentingini av mikudagsblaðnum, rættleiðing til ærumeiðandi grein í blaðnum fríggjadagin. Í staðin fyri at prenta rættleiðingina verða ósannindini endur tikin.

Tí fari eg at heita á tykkara blað um at prenta hesa rættleiðing.

Avsannan av lygusøgum

Blaðstjórin verður biðin um at hýsa hesi avsanning av teimum lygusøgum, sum vóru bornar í grein fríggjadagin, har boðskapurin var, at eg skuldi forfylgja fólki vegna teirra støðu í Verkamannafylkingini.

Høvuðssøgan er tann, at eg skal hava forfylgt Lillian Isaksen. Men hon hevur fingið eina fullkomiliga rella viðferð í sambandi við Felagið Fiskimannakonur. Annars ætli eg onga viðmerking at gera til hetta málið.

Síðan er tað tann grova skuldsetingin, at limir í Føroya Fiskimannafelag, sum stuðla »skeiva« partinum í VMF, mugu hótta við sakførara fyri at fáa atkvøðuseðil til tað sýsluformansval, sum fer fram í løtuni.

Eg hevði hoyrt hesa søgu áðrenn hon kom í »Oyggjatíðindi« og kann tískil upplýsa lesaranum um, at tað er Ingeborg Vinther, sum er upprunin til hesa lygusøgu.

Fyri at vísa hvussu »góður« fantasiur liggur aftanfyri, skal eg greiða frá hvussu eitt slíkt val fer fram:

Søknarformaðurin fyri hvørja søkn fær atkvøðuseðlar sendandi fyri sína søkn saman við einum telduskrivaðum lista yvir teir, sum hava valrætt. Í fylgibrævi verður gjørt vart við, at fyrivarni verður tikið fyri feilum. Um nakað ivamál er um atkvøðurætt skal atkvøðuseðil kortini latast, tí atkvøðurætturin verður undir øllum umstøðum eftirkannaður av grannskoðara felagsins, hagar allir atkvøðuseðlar verða sendir.

Afturat hesum verður kunngjørt í blaðum og útvarpi, at fiskimaður sum av misgáum ikki hevur fingið atkvøðuseðil, kann venda sær til skrivstovuna, og verður seðil tá sendur uttan dráil.

Grundarlagið fyri hesi lygusøgu hjá Ingeborg er ein limur, sum ikki stóð á listanum fyri Víg. Orsøkin vísti seg at vera tann, at maðurin var fyribils fluttur av landinum, og tí var hann skrásettur sum búgvandi uttanlands. Men tá hann gjørdi vart við seg á skrivstovuni fekk hann atkvøðuseðil uttan himpr.

Tað er óneyðugt at gera nakra viðmerking til slíkar útspillingar, og øll greinin í Oyggjatíðindum er á sama støði. Men tað er nóg mikið at staðfesta, at tað ber als ikki til at ávirka valið í FF á umtalaða hátt.

Sjálvur havi eg hildið meg fullkomiliga uttanveltaðan í tí vali, sum fer fram nú. Tað sama havi eg gjørt í teirri uppstilling, sum er farin fram undan valinum.

Tað er eftir øllum at døma meira enn onnur gera!

Óli Jacobsen

Um lesarabrøv o.l.

Lesarabrøv og líknandi tilfar, ið verður sent okkum, skal hava avsendara, t.v.s. navn, adressu og telefonnr. Blaðstjórin skal vita, hvør skrivað hevur eisini um brøv ynskjast dulnevnd í blaðið.

Vit kunnu annars ikki geva tykkum, ið skriva, vissu fyri, at lesarabrøv viðmerkingar o.l. koma í blaðið sama dag, sum tað er móttikið. Tað veldst um tøka setiorku og pláss.

Blaðstjórin